# ítróttur

Nr. 56 • hósdagur • 21. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


## VB hevur gallakvøld

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Í sambandi við at hondbóltskappingin endar komandi vikuskiftið, fer VB at skipa fyri gallaveitslu fyri øllum teimum, ið hava luttikið á ymiskan hátt í hondbóltinum í 1. deild hjá kvinnum og monnum.

Veitslan verður mikudagin 27. mars í VB-húsinum, har felagið bjóðar til borðhald við góðari matskrá og undirhald við sangi. Hilmar Jan og Robert skipa fyri. Undir borðhaldinum verður ársins leikari hjá monnum og kvinnum eisini kosnir.

Eftir borðhaldið spælir bólkurin Skák til dans og út ímóti morgni verður morgunmatur.

Smyril fer av Havnini mikudagin klokkan 12.

# Heimsins besta Heidi

**Heidi Andreasen av Eiði er komin í fínt selskab. Hon skal kappast ímóti fýra øðrum ítróttarfólkum um at gerast ársins ítróttarfólk í heiminum við breki. 16 ára gamli svimjarin sigur, at hon enn ikki hevur fatað, at júst hon er vald út, og at hon skal luttaka á gallakvøldi í Monaco við kendastu ítróttarstjørnunum í heiminum**

ÁRSINS ÍTRÓTTARFÓLK
*Stefan í Skorini*

Heidi Andreasen hevur ikki gjørt nógv við svimjingina seinastu tíðina, tí hon hevur havt ymsar skaðar at dragast við. Tó er hon ikki gloymd á altjóða ítróttarpallinum. Hon er nevniliga millum tey fimm innstillaðu til at gerast Worls Sportsperson Of The Year With A Disability hjá Laureus World Sports Awards.

Aðrir bólkar eru eisini, og hetta er eitt stórhending innan ítróttin, har nøkur av teimum kendastu ítróttarfólkunum í heiminum eru við, so sum Micheal Schumacher, Micheal Jordan, Jennifer Capriati, Steven Gerrard og Ian Thorpe.

– Eg dugi ikki at fata tað ordiliga enn, at eg skal vera á palli við so kendum stjørnum, og eg eri ótrúliga spent, sigur lítillætna Heidi Andreasen.

Heidi sjálv og tey nærmastu fingu boðini fyri nøkrum vikum síðani, men hetta hevur verið eitt loyndarmál inntil nú. Eiðisgentan fekk bræv frá Laureus felagsskapinum, meðan hon var á sjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

### Venjarin við

Av tí at Heidi er so ung á aldri, hevur hon fingið møguleika at bjóða einum persóni við til Monaco. Katrin Johansen, sum er venjari hjá Heidi, skal vera í fylgi við henni, tá tær fara til fyrstadømi við Miðalhavið.

– Katrin Johansen hevur ein part av æruni fyri tey góðu úrslitini, og hon er eisini ógvuliga errin av mær. Tí havi eg biðið hana komið við mær til Monaco, sigur Heidi.

Orsøkin til at Heidi hevur fingið hendan heiður eru góðu úrslitini í EM-kappingini í Stokkholm í fjør summar.

Tá fekk hon fýra gullmerki og eitt bronsumerki. Harumframt setti hon eitt heimsmet og eitt evropeiskt met. Heidi var eisini við á OL-leikunum í Sydney á sumri í 2000 saman við Ester Gaard Hansen. Tá fekk Heidi trý silvurmerki og eitt bronsumerki.

Síðani hevur hon tikið seg nógv fram, og í evropameistaraskapinum í Svøríki gjørdi hon veruliga bart. Eftir hesi úrslitini hava tey ovastu innan ítrótt fyri brekað fingið eygað á serstakliga evnaríku Heidi Andreasen av Eiði, og nú kann sigast, er hon komin á ovastu rók.

### Darvað av skaðum

Seinastu tíðina hevur Heidi Andreasen verið illa darvað av skaðum. Hon hevur vøddaskaða í báðum akslunum, tí at ávísir vøddar í akslunum eru vorðnir ov sterkir í mun til aðrar. Hetta hevur givið henni trupulleikar.

Hon hevur eisini fingið tvær skurðviðgerðir á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn fyri stuttum, og vinstra beinið er í gipsi í løtuni.

Hon er tó við at koma fyri seg aftur og væntar, at hon kann fara undir venjingarnar aftur í apríl, men hon leggur dent á, at tað verður frá grundini, tí hon hevur ikki vant í langa tíð.

### Tey kendastu

Millum gestirnar í Monaco verða nøkur av kendastu ítróttarfólkum í heiminum. Harumframt eru filmsstjørnur og fotomodell eisini boðin við.

Millum ítróttarfólkini, sum eru innstillað í teimum ymsu bólkunum, kunnu nevnast Formel 1 koyrarin Micheal Schumacher, kurvabóltsleikarin Micheal Jordan, tennisleikarin Goran Ivanisevic, fótbóltsspælarin Steven Gerrard, svimjararnir Ian Thorpe og Inge de Bruijn, tennisleikararnir Jennifer Capriati og Venus Williams og sjálvandi Heidi Andreasen. Harumframt er týska stórfelagið Bayern München eisini við í kappingini um at fáa heiður.

Eisini eru filmsstjørnur sum Sylvester Stallone og Micheal Douglas og Naomi Campbell, ið er fotomodel, boðin við.

– Eg hugsi eisini nógv um, hvussu eg skal vera ílatin til hetta høvi, sigur Heidi flennandi. Hon fekk í sambandi við innbjóðingina tvey videobond, sum vístu undanfarnu kappingarnar.

Enn hevur Heidi neyvan skrivað takkarrøðuna, sum hon skal halda, um hon vinnur, men hóast hon ikki verður kosin ársins ítróttarfólk í Monaco í mei mánaði, er hetta eitt megnar avrik, sum ikki eigur sín líka í føroyskari ítróttarsøgu.



*Heidi Andreasen er innstillað at gerast ársins ítróttarfólk við breki. Hon skal í hesum sambandi til Monaco, har tiltakið fer fram*



*Við sær til Monaco hevur Heidi Andreasen venjaran hjá sær, Kartin Johansen, í miðjuni. Til vinstru stendur Ester Gaard Hansen*



# Klokkureint sjálvmál



*- Sæð í bakspeglinum, so má søgan sigast at vera ótrúliga komisk, men eg kann lova fyri, at tað var alt annað enn stuttligt, meðan alt gekk fyri seg, sigur Øssur Winthereig um søguna, sum varð av ongum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Hóast apríl mánaður enn ikki er komin, so mundi redaktiónin í Sjónvarpinum kenna seg senda apríl, tá tey fingu skeivt nummar og harvið sendu eina veruliga dunnu**

MISSKILJING
*Jákup Mørk*

Danir rópa tað fyri »en and«, tá ein søga, sum kortini ikki er, kemur út í fjølmiðlarnar, og í so máta var tað ein vælvaksin jóladunna, sum kom á skíggjan hjá SvF týskvøldið.

Vitandi um at Fótbóltssambandið týsdagin sat á fundi, har venjaraspurningurin hjá landsliðnum var millum evnini á skránni, gjørdi Sjónvarpið eina roynd at verða fyrsti miðilin, sum kom við søguni.

### Søgan

- Vit høvdu eins og so nógv onnur hoyrt leysasøgur um, at nýggi maðurin í starvinum skuldi verða Benny Johansen. Frá fleiri álítandi keldum frættu vit, at hald var í slatrinum, og týsdagin settu vit okkum so fyri at fáa fatur í manninum.

Soleiðis byrjar tíðindaleiðarin í SvF, Øssur Winthereig, tá vit seint týskvøldið fingu orðið á hann, fyri at fáa eina frágreiðing uppá, hví tíðindini vórðu borin, sum tey vórðu. Ikki minst, tá FSF-bossurin, Dánjal Andreasen, endurgav Benny Johansen fyri at siga, at hann í hvussu so er ikki hevði tosað við føroyska sjónvarpið.

Óvitandi um, at Benny Johansen ikki longur er búsitandi í Silkeborg, hevði SvF fingið fatur í telefonnummarinum hjá einum Benny Johansen, sum er búsitandi í Silkeborg, og her gerst søgan veruliga stuttlig – ella syrgilig.

- Sæð í bakspeglinum, so má søgan sigast at vera ótrúliga komisk, men eg kann lova fyri, at tað var alt annað enn stuttligt, meðan alt gekk fyri seg, sigur Øssur.

- Eg rokni við, at hesin Benny Johansen í Silkeborg ígjøgnum ár og dag er uppringdur eitt ótal av ferðum, har fjølmiðlafólk av alskyns slag hava spurt hann um hansara hugsan um ymsar fótbóltsspurningar. Tí ger hann ikki mætari enn at spæla við, nú føroyska sjónvarpið ringir, og tá vit hava tosað við hann eina løtu, staðfestir hann, at hann skal gerast nýggjur landsliðsvenjari.

- Hóast hesa staðfesting, so vóru vit enn ikki heilt vísir. Vit bíðaðu sum longst, eftir at FSF-fundurin skuldi enda, men vit máttu bara staðfesta, at tað ikki bar til at fáa boðini um hetta fyri evstamark hjá okkum. Tískil ringdu vit eina ferð niður, og tá hesin Benny Johansen enn einaferð staðfesti, at hann skuldi gerast føroyskur landsliðsvenjari, og enntá sigur, at hann kemur til Føroya hósdagin, so valdu vit at koyra søguna, staðfestir tíðindaleiðarin.

### Alt fall saman

Eftir tíðindasending og Globus kom Sjónvarpið sum kunnugt við eykasending, har Dánjal Andreasen avsannaði, at Benny Johansen var settur í venjarasessin.

- Vit royndu sjálvandi av øllum alvi at greiða fløkjuna. Fyrst hildu vit kanska, at vit vórðu gjørdir til partar í einum spæli, sum vit ikki rættiliga skiltu, men spakuliga komu so allir brikkarnir í puslispælinum upp á pláss.

- Nú havi eg so ringt niður til tann veruliga Benny Johansen og givið honum einum treytaleysa umbering frá okkara síðu, og hóast hann kanska kundi havt orsøk til tað, so tóktist hann á ongan hátt at vera illur um hetta.

- At Útvarpið so júst hendan dagin vitjaði Sjónvarpið fyri at fáa tilfar til "góðan morgun Føroyar", ger so bara søguna enn stuttligari, og mikumorgunin fari eg so niðan at greiða frá, hvat tað var, sum veruliga hendi, so hetta verður ordiliga meiggjað út sigur Øssur Winthereig at enda.

Hesa søguna kundu lurtararnir hjá morgunsendingini hjá Útvarpinum so lurta eftir í gjáramorgunin, og hóast tað einki hevur við teir báðar fjaðrarnar og tær fimm hønurnar hjá H.C. Andesen sála at gera, so var tað um ikki annað søgan um, hvussu ein páskadunna av teimum heilt stóru varð til í SvF.

## Fakta um Benny Johansen

Benny Johansen er væl kendur í donskum fótbólti. Hann var í síni tíð ein vandamikil álopsspælari. Hann umboðaði B1903 í Keypmannahavn. Hetta var síðst í seksti og fyrst í sjeyti árunum. Millum liðfelagarnar var Christian Andersen, sum síðani hevur verið venjari í m. a. AB og FCK, og sum nú er venjari í Farum. Ein annar liðfelagi var Allan Michelsen, sum hevur verið venjari í fleiri donskum feløgum.

Eftir at hann gavst at spæla fótbólt hevur Benny Johansen verið venjari hjá fleiri feløgum. Hann var venjari hjá B1903, og tá hetta felagið legði besta liðið saman við KB, og felagsliðið varð nevnt FCK, var Benny Johansen fyrsti venjarin. Tað hilnaðist sera væl, tí FCK vann DM við Benny Johansen sum venjara.

Seinni var Benny Johansen í fleiri ár venjari í Silkeborg. Har hilnaðist tað eisini væl, men so gekk minni væl. Síðsta heyst hevði soltna úrtøkan hjá Silkeborg við sær, at Benny Johansen fekk sekkin. Hann hevur ikki verið venjari síðani tá. Síðst í januar kom hann í samband við Fótbóltssambandið. Tað hevur síðani verið upp á tal, at danski venjarin skuldi í fulltíðarstarv sum venjari hjá føroyska landsliðnum. Týskvøldið varð tað greitt, at Benny Johansen verður ikki fulltíðarsettur venjari hjá FSF.

# Benny hevur ikki tosað við SvF

**FSF formaðurin sigur seg einki skilja av, at Dagur og vika týskvøldið segði seg hava váttan frá Benny Johansen um, at hann varð settur í landsliðsvenjara starvið**

LANDSLIÐSVENJARIN
*Jóannes Hansen*

Týskvøldið visti Dagur og vika fyrst at siga, at Benny Johansen var settur í starv sum føroyskur landsliðsvenjari. Sjónvarpið segði seg hava tíðindini frá venjaranum sjálvum, og hann gleddi seg at koma til Føroya longu í dag. Seinni í sendingini hevði Dagur og vika samband við Dánial Andreasen, FSF formann, sum ikki segði seg kenna til, at Benny Johansen hevði fingið boð um, at hann var settur í starv hjá Fótbóltssambandinum.

Einki var at siga til, at fótbóltsáhugaðu føroyingarnir undraðust, og at tað millum fólk kendist sum um støðan í FSF var turbolent. Men FSF bossurin Dánial Andreasen var púra avkláraður, tá vit fingu orðið á hann týskvøldið:

– Eg havi í kvøld tosað við Benny Johansen. Tað var mín lutur at ringja til hansara og boða honum frá avgerðini, sum var tikin á nevndarfundinum í FSF. Benny Johansen var spentur uppá at fara undir nýggju uppgávuna, men hann var greiður yvir, at eingin sáttmáli var undirskrivaður. Sjálvandi harmaðist hann um, at samstarvið nú ikki bleiv til nakað, men hann segði seg skilja støðuna hjá okkum.

Hví hevur hann so í Degi og viku sagt, at hann longu hósdagin skuldi til Føroyar?

– Eg segði honum, at føroyska sjónvarpið týskvøldið hevði endurgivið hann fyri at hava sagt millum annað, at hann fór til Føroya hósdagin, og at hann nú skuldi læra føroyingar orduliga at spæla fótbólt. Benny Johansen skilti einki av hesum. Hann segði seg ongantíð hava tosað við Sjónvarp Føroya. Frágreiðingina um hasa sjónvarpssøguna mugu tit fáa onkra aðra staðni enn frá Fótbóltssambandinum, var viðmerkingin hjá Dániali Andreasen týskvøldið.